# VIKULIÐIÐ

vodafone deildin VIKA 18

*Ítróttartoymi úttekur Vikuliðið, og eru leikarans avrik mett út frá Vodafone-dystunum í farnu viku.*




Uppstilling: **3-4-3**

## 1. DEILD KVINNUR

**Skála - Víkingur** 1-1 (0-0)
0-1 Hanna I. Højgaard (76.)
1-1 Jóna P. Jacobsen (90.) br.sp.

**EB/Str. - AB** 0-6 (0-1)
0-1 Valgerð Andreasen (4.)
0-2 Doris í Garði Joensen (51.)
0-3 Rudi Rasmussen (58.)
0-4 Olga Kristina Hansen (80.)
0-5 Olga Kristina Hansen (87.)
0-6 Hellen Haraldsen (90.)

## 1. DEILD MENN 6. UMFAR:

**TB - Víkingur** 2-1 (1-0)
1-0 Dan Mortensen (15.)
1-1 Ingi Sørensen (64.)
2-1 Magnar Vang (90.)
*Reytt kort: Heini Mortensen, TB*

**AB-NSÍ** 2-3 (2-1)
1-0 Sjálvmál (3.)
2-0 Jákup Dam (6.)
2-1 Erland B. Danielsen (27.)
2-2 Sjálvmál (61.)
2-3 Monrad Holm Jacobsen (83.)

**B68-HB 4-1 (2-1)**
0-1 Bjarki Johannesen (21.)
1-1 Símun Eliasen (31.)
2-1 Óli R. Hansen (39.)
3-1 Jóan Magnus Dalbø (78.)
4-1 Emil Olsen (84.)

**EB/Str. - FCH** 1-1 (1-0)
1-0 Esmar Eiðisgarð (33.)
1-1 Bogi Hermansen (78.)

**KÍ - 07 Vestur** 4-2 (2-2)
1-0 Henry Heinesen (16.)
1-1 Jovan Panic (19.)
1-2 Jens Erik Rasmussen (29.)
2-2 Henry Heinesen (br)(37.)
3-2 Jógvan Isaksen (85.)
4-2 Steffan Kalsø (90.)

## Føroyska 1. Deild *menn*

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNI | JAVNT | TAPT | + MÁL | - MÁL | +/- | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | 07 Vestur | 6 | 4 | 1 | 1 | 11 | 7 | +4 | 13 |
| 2 | HB II | 6 | 4 | 0 | 2 | 15 | 10 | +5 | 12 |
| 3 | KÍ | 6 | 3 | 2 | 1 | 14 | 7 | +7 | 11 |
| 4 | TB | 6 | 3 | 1 | 2 | 9 | 9 | 0 | 10 |
| 5 | EB/Streymur II | 6 | 2 | 3 | 1 | 7 | 7 | 0 | 9 |
| 6 | Víkingur II | 6 | 2 | 1 | 3 | 12 | 13 | -1 | 7 |
| 7 | FC Hoyvík | 6 | 1 | 3 | 2 | 6 | 6 | 0 | 6 |
| 8 | AB II | 6 | 2 | 0 | 4 | 9 | 11 | -2 | 6 |
| 9 | NSÍ II | 6 | 1 | 3 | 2 | 7 | 9 | -2 | 6 |
| 10 | B68 II | 6 | 0 | 2 | 4 | 3 | 14 | -11 | 2 |

# KÍ og TB koma inn aftur í hitan

**1. DEILD MENN** Aftaná heimasigrarnar hjá KÍ og TB er alt víðopið aftur í uppflytingarstríðnum í næstbestu fótbóltsdeildini

Heri Simonsen

KÍ meldaði seg inn aftur í uppflytingarstríðið við einum góðum 4-2 sigri á oddaliðnum, 07 Vestur. KÍ kom á odda 1-0, tá eitt stórt korter var farið av fyrra hálvleiki, og var tað Henry Heinesen, sum var á blettinum. Eftir hetta komu teir bestu 10 minuttirnir hjá 07 Vestur í dystinum. Í 19. Minutti javnaði Jovan Panic, og tá góður hálvur tími var farin, legði superveteranurin, Jens Erik Rasmussen 07 Vestur á odda 2-1. Átta minuttir fyri leiklok fekk KÍ brotsspark, og eydnaðist tað Henry Heinesen at javna til 2-2. Ikki fyrr enn fimm minuttir vóru eftir av vanligu leiktíðini, eydnaðist tað KÍ at vinna seg framum við einum máli, sum Jógvan Isaksen skeyt. Í yvirtíðini staðfesti Steffan Kalsø sigurin, og ta rættaðu uppflytingarkósina hjá KÍ.

### Vunnu við 10 monnum

Hjá TB gekk eftir ætlan tíðliga í dystinum, tá liðið kom á odda við einum máli, sum Dan Mortensen setti í netið, tá eitt korter var farið av dystinum. Tvær strikur komu tó í rokningina hjá ellisforsetanum í seinna hálvleiki. Fyrst var Heini Mortensen hjá TB rikin av vølli, og Ingi Sørensen javnaði fyri Víking, og tá sá veruliga svart út hjá TB, men í yvirtíðini sendi Magnar Vang alt Sevmýri í ekstasu, tá hann skoraði sera týdningarmikla sigursmálið fyri TB, sum nú aftur er har tað er stuttligt at verða.

### Taptu hóast tveymálsleiðslu

Teir næstbestu hjá AB fingu eina rimmarbyrjan uppá dystin ímóti NSÍ. Tá bert seks minuttir vóru farnir, vóru argjamenn á odda 2-0, fyrst við einum sjálvmáli, og stutt aftaná við einum máli hjá Jákupi Dam. Men Argjamenn megnaðu ikki at gagnnýta henda fyrimunin. Tá 27 minuttir vóru farnir reduseraði Erland B. Danielsen til 2-1, og tá ein stórur tími var farin komu argjamenn sær sjálvum í óføri, við at gera sjálvmál. Tá bert sjey minuttir vóru eftir av vanligu leiktíðini vendi Monrad Holm Jacobsen hjá NSÍ øllum á høvdið við at skora sigursmálið fyri NSÍ.

### Aftur ein HB-sigur

Teir næstbestu hjá HB vunnu sín fjórða sigur, og megnaðu at vinna seg uppá annað plássið við einum greiðum 4-1 sigri á teimum næstbestu hjá B68. Tað var tó B68, sum kom til orðanna fyrst. Bjarki Johannesen legði B68 á odda, tá 21 minuttir vóru farnir, men longu 10 minuttir seinni javnaði leikandi venjarin hjá HB, Símun Eliasen. Óli R. Hansen legði HB á odda 2-1 seks minuttir undan steðginum, og seinasta korterið staðfestu Jóan Magnus Dalbø og Emil Olsen sigurin hjá HB, sum spælir ein rættiliga eyðsýndan leiklut í tí næstbestu deildini.

### Javnt hjá hoyvíkingum

Hoyvíkingar hava ikki meldað seg veruliga uppí uppflytingarstríðið enn. Leygardagin spældi FC Hoyvík á útivølli ímóti EB/Streymi. Tá 33 minuttir vóru farnir legði Esmar Eiðisgarð EB/Streym á odda 1-0, sum leingi sá út til at gerast endaliga úrslitið. Tá 12 minuttir vóru eftir av vanligu leiktíðini eydnaðist tað Boga Hermansen at javna fyri FC Hoyvík, sum í skrivandi stund má hugsa um at sleppa undan niðurflytingini.

*heris@sosialurin.fo*